# Tordu ikki í konfirmatión

**Aftur í ár oyðilegði hóttanin um verkfall ein hin størsta dagin í lívinum hjá teimum ungu í Hvalba og Sandvík**

VERKFALSHÓTTAN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Smyril er heftir at heili fimm fakfeløgum og hvørja ferð okkurt av hesum er uppi í eini ósemju, verður lann lagdur*

Sunnudagin var konfirmatión í Hvalba og í Sandvík. Hjá 16 konfirmantum úr hesum báðum bygdunum var hetta ein hin størsti dagurin í lívinum.

Men aftur í ár varð konfirmatiónin fyri ein stóran part oyðiløgd av hóttanini um verkfall.

Eyðvitað skuldi fólk koma frá fjar og nær at hátíðarhalda henda stóra dagin saman við konfirmantunum og húski teirra.

Men nú hóttanin um verkfall hekk yvir landinum, vóru tað nógv, sum ikki hættaðu sær suður í konfirmatión. Eitt møguligt verkfall fór nevniliga at leggja skipini hjá Strandferðsluni, lamin.

Maskinmeistarafelagið og Fíggjarmálaráðið settust til samráðingarborðið longu fríggjadagin saman við semingsmonnunum, men sunnudagin var framvegis ongin ábending um, hvønn veg tað bar.

Samdust partarnir ikki um ein nýggjan sáttmála, fór tað at leggja bæði Smyril og fleiri onnur skip hjá Strandferðsluni lamin.

Sostatt vóru tað mong, sum ikki hættaðu sær suður í konfirmatión, tí tey stúrdu fyri at stranda í Suðuroynni, varð verkfall ella verkbann lýst mitt í øllum.

Hjá fleiri konfirmantum, sum høvdu røtur norðanfyri, tók hetta rættiliga glansin av degnum.

Vit hava fingið at vita, at hjá onkrum av konfirmantunum vóru tað yvir 20 døgverðagestir, sum skuldu koma norðaneftir, men sum settust aftur, tí teir tordu ikki suður. Hjá øðrum varð talið eitt sindur minni. Men eftir sótu nógvir konfirmantar við eini hálvari konfirmatión, innibrendir við døgverða til øll hesi fólkini, sum ikki kundu koma.

Onkur hevði enntá eisini fingið gestir uttanlands, men hesir gestirnir máttu eisini av aftur landinum nógv fyrr enn ætlað, tí teir kundu ikki loyva sær at liggja fangaðir í einum verkfalli í Føroyum.

Hjá summum húskum var hetta aðru ferð, at verkfall oyðilegði eina konfirmatión og hjá onkrum var tað enntá triðju ferð.

### Rakar Suðuroynna serliga hart

Og sum vanligt, er tað at kalla bara Suðuroyggin, sum eitt verkfall rakar, tí norðanfyri gekk alt sína vanligu gongd.

Politikarar hava í fleiri ár tosað um at bera so í bandi, at ósemjur á arbeiðsmarknaðinum skuldi ikki ávirka samferðsluna.

Tað skuldi gerast við at gera manningarnar á strandfaraskipunum til tænastufólk, ella í hvussu so er at fáa tey undir eina tænastumannalíknandi skipan, so at tey ikki kundu fara í verkfall.

Men hóast tosað hevur verið um hetta í fleiri ár, upplýsti formaðurin í maskinmeistarafelagnum, Jògvan Nybo fyri Sosialinum, at teir høvdu aldrin hoyrt hvørki orð ella eið frá politiska myndugleikanum um hetta.

Serliga hart raka hesar ósemjur á arbeiðsmarknaðinum sambandið til Suðuroyar, tí heili fimm fakfeløg eru knýtt at Smyrli: Skipara og navigatørfelagið, Maskinmeistarafelagið, Starvsmannafelagið og enntá Havnar Arbeiðsmannafelag, tí teir sum binda Smyril í Havn eru limir har. Og teir, sum binda Smyril í Trongisvági, eru limir í Føroya Arbeiðarafelag.

Sostatt liggur Smyril, hvørja ferð okkurt av hesum feløgum er í eini ósemju á arbeiðsmarknaðinum- og tey, sum hava fylgt við seinastu árini, vita, at tað er í heilum, at okkurt av hesum feløgunum, ikki eru til arbeiðis.

## Sjálvræðið er drúgvasta tilfeingi

**Tjóðveldisflokkurin hildið floksting undir herrópinum Virðisøking í vinnuni, ímillum fólk og ímillum tjóðir**

Sjálvræðið er drúgvasta tilfeingi hjá føroysku tjóðini.

Tað staðfesti tjóðveldisflokkurin á flokstinginum í Klaksvík hetta vikuskiftið.

Við herrópinum Virðisøking í vinnuni, ímillum fólk og ímillum tjóðir hevði tjóðveldisflokkurin floksting um vikuskiftið.

Á flokstinginum vóru tríggir gestarøðarar.

Steingrímur J. Sigfússon, íslendskur altingsmaður og formaður í flokkinum Vinstri-Grænir og fyrrverandi landbúnaðar- og samferðslumálaráðharri í Íslandi lýsti sín fulla stuðul til stríðið fyri føroyskum fullveldi og greiddi frá íslendsku sjálvstýrisgongdini.

Niðurstøða hansara er, at eftir at íslendingar tóku ræðið í egnum landi, hevur Ísland ment seg frá at vera fátækasta landið í vesturheiminum til at vera ímillum ríkastu londini í heimi. Hann vísti á, at hetta var sjálvræðinum fyri at takka. Hann lýsti sjálvræði og javnbjóðis samstarv millum tjóðir, sum týdningarmesta tilfeingið fyri eitt fólk.

Egil Olsen, stjóri í Faroe Marine Biotech vísti á teir ovurstóru møguleikar ið eru fyri at fáa virðisøking burturúr fiskivinnuni, um vit gagnnýta alt tilfeingið á fiskinum. Hann vísti á tær góðu royndir, ið longu eru gjørdar, og hvussu vit við biotøkni og hjávørum til matna kunnu skapa nýggjar inntøkur og vinnuvegir.

Hann fýltist á, at Framtaksgrunnurin ikki verður brúktur til at gera verulig framtøk fyri nýggjar vinnuvegir í Føroyum, men ístaðin setir pengar í kreppuraktar fyritøkur og vinnur og brúkar pengar til at kappast við vinnulívsfólk í vinnuni.

Malena Arnholdsdóttir, forkvinna í Javna greiddi um Javna og hugsjónini um, at øll menniskju hava virðir og evni, ið kunnu mennast. Hon mælti til miðvíst at geva menningartarnaðum rætt til bústað og arbeiði, og at fáa greiningarmiðstøð setta á stovn.

### Nýggj fólk í starvsnevnd

Á flokstinginum var eisini val til starvsnevnd og aðalstjórn floksins.

Jóannes Dalsgarð varð valdur formaður í aðalstjórnini, og næstformaður í starvsnevndini fyri Heidi Petersen, sum nú situr á tingi.

Torbjørn Jacobsen varð valdur til politiskan næstformann fyri Heina O. Heinesen, sum ikki er á tingi longur.

Kristina Háfoss varð vald sum starvsnevndarlimur fyri Annlis Bjarkhamar, ið bar seg undan afturvali.

Starvsnevndini sostatt mannað soleiðis: Høgni Hoydal er formaður, Jóannes Dalsgarð er formaður aðalstjórnini og næstformaður í starvsnevndini, Torbjørn Jacobsen er politiskur næstformaður, Áki Jacobsen er kassameistari, Heidi Petersen er starvsnevndarlimur vegna tingbólkin og Kristina Háfoss er starvsnevndarlimur.

Eftir flokstingið gjørdi flokkurin eisini eina yvirlýsing, sum er á síðu 15.

# Tora ikki at keypa fisk

**Hóttanin um verkfall ger, at Fiskavirking á Tvøroyri torir ikki at keypa fisk og sostatt missur fólkið nógvar arbeiðstímar**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Hóttanin um verkfall hevur havt avleiðingar fyri Fiskavirking í Suðuroy, tí har hava tey ikki torað at keypt fisk, sum støðan er*

Á virkinum hjá Fiskavirking á Tvøroyri, eru tey ikki fegin.

Verkfall hevur hótt Strandferðsluna síðani leygarkvøldið og tað merkist eisini á flakavirkinum hjá Fiskavirking á Tvøroyri.

So leingi óvissan er um ferðasambandi, tora tey ikki at keypa fisk, tí vandi er fyri, at tey koma at liggja innibrend við honum.

Ì gjáramorgunin høvdu tey bara arbeiði til dagin í gjár, so bleiv ikki meiri, sum støðan er.

Sostatt hevur bara hóttanin um verkfall kosta virkinum, og arbeiðsfólkinum, ein hóp av peningi.

Í farnu viku hevði virkið á Tvøroyri keypt heilt fitt á kongafiski, men hóttanin um verkfall fekk tey aty umhugsa at flyta fiskin norður um fjørð, so at hann kundi virkast á onkrum virkið norðanfyri, tí tey eru ikki rakt av einum møguligum verkfalli.

Men tey tóku kansin og arbeiddu hann á virkinum á Tvøroyri kortini.

Á Fiskavirking á Tvøroyri siga tey, at tað, sum hevur størstan týdningin, er at fáa fisk av landinum við Norrønu hóskvøld, men sum støðan er, tora tey ikki at satsa uppá tað.

Fiskavirking sigur, at tað er serliga virksemið í Suðuroy, sum eitt møguligt verkfall rakar, tí í allari restini av landinum, er virksemið sum vant.

Støðan er ótolandi, serliga nú fiskivinnan er so hart kroyst frammanundan.

Samstundis missur Fiskavirkið álitið hjá viðskiftafólkunum, tí tað kann vera tungt at vinna aftur.

Eisini tey, sum fáast við fiskivinnu, sakna, at politikarar gera álvara av tí, sum teir hava sagt í fleiri ár um at bera so í bandi, at siglingin hjá Strandferðsluni skal verða undantikin ósemjum á arbeiðsmarknaðinum.

Politikarar hava í fleiri ár tosað um at bera so í bandi, at ósemjur á arbeiðsmarknaðinum skuldi ikki ávirka siglingina hjá Strandferðsluni.

Tað skuldi gerast við at gera manningarnar á strandfaraskipunum til tænastufólk, ella í hvussu so er at fáa tey undir eina tænastumannalíknandi skipan, so at tey ikki kundu fara í verkfall.

Men hóast tosað hevur verið um hetta í fleiri ár, upplýsti formaðurin í maskinmeistarafelagnum, Jógvan Nybo fyri Sosialinum, at teir høvdu ongantíð hoyrt nakað aftur til hesa ætlanina.

Serliga hart raka hesar ósemjur á arbeiðsmarknaðinum sambandið til Suðuroyar, tí heili fimm fakfeløg eru knýtt at Smyrli: Skipara og navigatørfelagið, Maskinmeistarafelagið, Starvsmannafelagið og somuleiðis eru bæði Havnar Arbeiðsmannafelag og Føroya Arbeiðarafelag knýtt at Smyrli,tí har eru teir limir, sum binda Smyril ávikavist í Havn og í Trongisvági.

Sostatt liggur Smyril, hvørja ferð okkurt av hesum feløgum er í eini ósemju á arbeiðsmarknaðinum- og tey, sum hava fylgt við seinastu árini, vita, at tað er í heilum, at okkurt av hesum feløgunum, ikki eru til arbeiðis.



# Kvinnulisti til býráðsvalið í Havn

**Stig verða nú tikin til at gera ein kvinnulista í Tórshavnar kommunu til býráðsvalið í heyst. Ein kvinnufelagsskapur í Havn tekur stig til hetta og hevur heitt á Kvinnufelagið um at stuðla teimum**

POLITIKKUR
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Kristianna Rein, fyrrverandi býráðslimur í Tórshavnar býráð, heldur tað vera eitt frálíkt hugskot at gera ein kvinnulista til býráðsvalið í heyst*

*Savnsmynd*

Nógv tos hevur verið um, at kvinnur ikki halda seg til, tá tað kemur til politikk. Nógvar verða orsøkirnar sagdar at vera, men í hesum døgum arbeiðir kvinnufelagsskapurin Urd við møguleikunum fyri at gera ein kvinnulista í Tórshavnar kommunu.

Stovnandi fundurin var mánakvøldið á Læraraskúlanum, men av tí at blaðið var farið til prentingar áðrenn fundin, so ber ikki til at siga, hvussu fundurin gekk.

Men í brævið, sum Kvinnufelagið hevur sent út til sínar limir, verður greitt frá, hvørjar ætlanir Urd hevur.

Eisini verður nevnt, hvussu aðrar roynir við at gera kvinnulistar hava gingið.

Kvinnufelagið roynditvær ferðir í 50´unum og tvær ferðir í 80´unum at gera kvinnulistar. Ta einu ferðina í 50´unum eydnaðist tað einari kvinnu at verða vald á listanum, meðan tað ikki eydnaðist í hinum førunum. Tó restaði lítið í, skal sigast.

Kvinnufelagið staðfestir bert í teirra brævi, at kvinnur eru í roynd og veru nærum í somu vánaligu støðu, hvat stýringini av samfelagnum viðvíkur – nú sum tá hinar royndirnar vórðu gjørdar.

### Ójavnar meiningar

Tað tykist, sum tað er misjavnt, hvussu kvinnur, sum eru ella hava verið aktivar í politikki, taka undir við hesum tiltakinum. Í blaðnum í dag hevur Elin Lindenskov eina viðmerking til kvinnufelagið, har hon heitir á felagið um heldur at stuðla teimum kvinnunum, sum eru á listanum hjá einum av flokkunum enn at stuðla einum reinum kvinnulista.

Elin vísir á, at vandi kann fara at verða fyri, at ein kvinnulisti tekur atkvøður frá teimum kvinnunum, ið stilla upp fyri flokkar.

Men Bergtóra Hanusardóttir, forkvinna í Kvinnufelagnum heldur, at hetta er vælskilligt, at kvinnur taka seg saman til at gera ein kvinnulista til býráðsvalið.

– Felagið skilir væl, at farið verður undir eitt tílíkt tiltak, sigur hon.

Kristianna Rein, sum hevur verið býráðslimur í Tórshavnar býráð, heldur tað vera eitt frálíkt hugskot at gera ein kvinnulista.

– Eg eri komin til ta niðurstøðu, at ein reinur kvinnulisti er einasti máti at fáa fleiri kvinnur upp í politikk, sigur fyrrverandi býráðslimurin í Havn.

Kristianna hevur arbeitt innan politikk í einum ávísum flokki í fleiri ár, og heldur hon, at á ein ella annan hátt er tað truplari hjá kvinnum at sleppa framat á einum flokslista. Hon dugir tó ikki at siga, hvør orsøkin er til hetta, men trupulleikin er har, staðfestir hon.

Og samstundis leggur hon dent á, at tað neyvan altíð er tí, at kvinnur ikki vilja stilla upp, sum er orsøkin til, at tær halda seg aftur.

– Nevniliga hesin spurningurin um kvinnur skulu velja kvinnur er trupul, tí at krøvini til eina kvinnu í politikki eru nógv størri enn til menn. Her meini eg við, at menn verða skjótari fyrigivnir, um teir gera eitt mistak enn kvinnurnar, og tað kann uttan iva vera ein av orsøkunum til, at kvinnur er bangar fyri at halda seg framat, sigur Kristianna Rein, sum ikki heldur, at kvinnur eru verri egnaðar til at arbeiða í politikki enn menn.

– Hatta er eitt frálíkt hugskot, og eg stuðli tí 100 %, slær hon fast.

Fyrireikararnir sjálvar til fundin vilja ikki siga so nógv um hetta enn, men tær høvdu so neyvan tikið stig til hetta, um tær ikki hildu, at tørvurin var tilstaðar.



*Føroya Bjór vann greitt á øllum hinum donsku ølunum – eisini á bæði Carlsberg og Tuborg*

## Føroya Bjór vann kapping um besta páskabryggið

**Annað árið á rað vann Føroya Bjór greitt kappingini um besta páskabryggið, sum Selskab for Vestjysk Ølkultur skipar fyri**

ØLSMAKKING
*Eirikur Lindenskov*

72 limir í Selskab for Vestjysk Ølkultur settu sær sum mál herfyri at royndarsmakka níggju ymisk páskabryggj anno 2004 fyri at finna ársins páskabryggj.

Talan var um blindsmakking, so at metingin skuldi verða so óheft, sum gjørligt. Ølið var einans mett út frá lukti, liti, smakki og eftirsmakki.

Úrslitið var, at Føroya Bjór Páska Bryggj var greiður vinnari.

Hetta er triðju ferð, at føroyska ølið var millum smakkiroyndirnar hjá Selskab for Vestjysk Ølkultur. Fyrstu ferð var í 2002, og tá var Føroya Bjór kosið næstbesta ølið, men eisini í 2003 varð Føroya Bjór greiði vinnarin.

– Tað er bara ein vansi við føroyska páskabrygginum. Tað er ikki at fáa til keyps her á leiðini, sigur formaðurin í Selskab for Vestjysk Ølkultur, Jan Larsen í Vinderup.

Hini páskabryggini, sum vóru við í kappingini, vóru Albani Påskebryg, Cars Påske hjá Carlsberg, Påske Beer hjá Hancock, Harboes Påskebryg, Alm. Påskebryg hjá Thisted Bryghus og Kylle Kylle hjá Tuborg.

# Dáin 15 ár

**Hósdagin verður opið hús í Dáanum í Klaksvík, tí tá fyllir umlættingarheimið 15 ár**

HÁTÍÐARDAGUR
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Hósdsagin 1. apríl millum klokkan 16 og 18, fer umlættingarheimið, Dáin í Klaksvík, at hava opið hús í samband við, at stovnurin hevur 15 ár á baki.

Umframt te, kaffi, køkur og sang, verða eisini røður hildnar. Jona Nielsen, nevndarformaður og Jóna Olsen, sum var leiðari, tá Dáin læt upp, fara at flyta fram røður.

Starvsfólkið vóna, at nógv fólk fara at nýta høvið at koma inn á gólvið í Dáanum føðingardagin.

Í Dáanum eru 6 døgnpláss og 4 pláss fyri dagumlætting. Fólk í øllum aldri, úr øllum landinum koma til umlætting í Dáanum. Yngsti brúkarin er 3 ár og tann elsti er 82.

Tað er ikki ov nógv sagt, at Dáin var ein kærkomin og alneyðugur stovnur, sum, um vit kunnu siga tað so, eigur lívið í mongum avvarandi at menningartarnaðum.

Tey, sum gjøgnum árini hava komið til umlætting í Dáanum, hava trivist væl í hugnaliga og fjálga umhvørvinum har.



*Starvsfólkið í Dáanum í Klaksvík vóna, at nógv fólk fara at nýta høvið at koma inn á gólvið føðingardagin hósdagin*